## DAGSINS MEINING

# Valið í Norðoyggjum!

Í farnu viku gjørdu vit ymsar metingar um valið. Vit umrøddu spenningin, sum er í Sandoy, Vágoy og Norðstreymoy. Eisini í stórum valdømum so sum Norðoyggjum kann kappingin gerast spennandi. Stóri spenningurin í Norðoyggjum er, um A megnar at varðveita sínar báðar sessir, og somuleiðis um B og D kunnu fáa tingmenn valdar. Hóast E hevur havt stórar vónir til tveir tingmenn í Norðoyggjum, verður tað helst til eina tá avtornar. At B, sum ongantíð hevur verið at rokna við í hesum heldur sjálvstýrissinnaða partinum av landinum, fór at stilla upp við nýggjum valevnum, hevði væl heldur eingin roknað við.

Hóast veljarakanningarnar ikki eru serliga hugaligar, so hevur A víst seg at klára seg væl í Norðoyggjum, tá avtornar. Tað er heimabeitið hjá løgmanni og hjá fyrrverandi borgarstjóranum, Jógvan við Keldu, sum plagar at hála nógvar atkvøður til flokkin, tá ástendur. Spurningurin er, um fólk fara at atkvøða lokalt, sum tey plaga, ella um fullveldisrákið hevur fingið veljararnar at skifta flokk, tvs. um meira hóvligu sjálvstýrisfólkini í A fara til B ella D og um fullveldisfólkini í A fara yvir til E. Hetta kann gera, at A bert fer at fáa ein tingmann í háborg síni í Norðoyggjum. Og tað kann blíva veruligu mønustingurin fyri flokkin, sum heldur ikki er spáddur eitt gott val aðrastaðni í landinum.

Spurningurin er, um B og D megna at "stjala" frá teimum stóru. Ivasamt er tó, um B megnar at fáa mann í Norðoyggjum. Vit skulu aftur til tíðina, tá Eli Nolsøe stóð á brúnni, fyri at finna B við umboði úr Norðoyggjum. Men B hevur so roynt at stilla upp við nýggjum og lutvíst kendum fólkum. Sambart veljarakanningunum fer B at hava framgongd, men spurningurin er so aftur, um henda framgongdin verður nóg mikið til at geva ein sess í hesum annars sjálvstýrissinnaða valdøminum.

D, ið fyrr átti fastan sess í Norðoyggjum, hevur ikki víst ta stóru styrkina seinastu árini. Nú hevur hann so átt ein týðandi landsstýrissess í fýra ár. Spurningurin er, um Elttør hevur vunnið sær nýggjar stuðlar og megnar at savna gomlu sjálvstýrisatkvøðurnar aftur eftir at hava røkt týdningarmikla oljumálaráðharrasessin. Fyri D ræður um at savna so nógvar atkvøður kring alt landið, soleiðis at tær íalt geva ein tingsess. Hann kann tó enda í Eysturoynni men eydnast D at koma í samgongu aftur, kann henda, at Elttør sleppur aftur í sess sín.

Hin stóri flokkurin í Norðoyggjum C hevur víst seg at vera tryggur, tó at hann onkuntíð hevur verið í vandaøki. Tað skuldi verið løgið, um tað ikki eydnast C at vinna henda sessin aftur. Vilhelm Johannesen er gamal í garði og hevur víst seg at eiga ein rættiliga tryggan veljaraskarða. Har eru so eisini onnur valevni, sum kunnu tryggja flokkinum mannin. Men tað er greitt, at C skal ansa eftir ikki at taka sum givið, at tað endurvinnur sín umdømisvalda. Fyri at tryggja C eitt gott landsval er tað ein fortreyt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Til Hans Andrias M. Joensen

**Ingi Kirke**

Góði tú

Vinarliga ikki pilka eitt einkult skrifstað úr Guds heilaga orðið, fyri at frambera ein sjúkligan hugsunnarhátt!

Kennir tú Gud? Hann sum hevur skrivað Bíbliuna? Nei, tað gert tú ikki! Tí kendi tú Hann, so visti tú eisini, at slíkur kærleiki sum tú sipar til millum menn, er andstygd fyri Gudi!

*Fy. Mós. 2, 22-24: Av rivinum, ið Hann hevði tikið úr Ádami, myndaði Gud Harrin kvinnu og leiddi hana til Ádam. Tá segði Ádam: "Hesa ferð er tað bein av mínum beinum og hold av mínum holdi! Hon skal eita kvinna, tí av manninum er hon tikin." Tí fer maðurin frá faðir og móður og heldur seg til konu sína, og tey bæði verða eitt hold.*

Maðurin fer frá faðir og móður, tí tað skal ein av hvørjum kyni til fyri at skapa eitt nýtt menniskja. Og hann fer og heldur seg til konu sína. Tí tað var ein kvinna, ið Gud Harrin skapti til mannin. Kennir tú Gud nú?

*Triðja Mós. 18,22: Tú mást ikki liggja hjá mannfólki, soleiðis sum ein liggur hjá kvinnu — tað er andstygd!*

Vónandi skilir tú, at menniskjað var skapt sum maður og kvinna. Men sum rómbrævið sigur, so høvdu tey jú skift sannleika Guds um við lygn og ærdu og dýrkaðu skapningin fram um skaparan. Róm. 1,25.

Hetta er ikki Guds vegur, men menniskjans. Tað er ikki eitt einasta stað í allari Bíbliuni, sum gevur nakað boð, ella lærir okkum um slíkan andstyggiligan kærleika millum menn!

Mín áheitan til tín er tí; lær Gud at kenna áðrenn tú sleingir slíka villleiðandi læru út millum menniskju, í einum landi sum enn, lovaður veri Harrin, heldur seg reinan á hesum økji. Enn eru tær "neyðugu lógirnar" ikki gjørdar sum geva gjeikarum/samkyndum somu kor í Føroyum sum í hinum norðurlondum.

Lati ikki Guds bann koma yvir hesar oyggjar!

# Kære politikere!

**Nina Dahl**

Sad i venteværelset hos lægen, havde ondt i ryggen. En kone kom ind, jeg kendte hende godt. Hun er rengøringskone på en af skolerne. Åhh, sagde hun og satte sig ned, jeg har så ondt i armene, at du bare ikke aner det, klarer knapt nok at vride en klud. Så var det min tur, og jeg gik ind til lægen og fortalte ham, at jeg havde ondt i ryggen. Tja, sagde han, det er slid, det må du nok finde dig i. Jeg kan selvfølgelig sygemelde dig i nogen dage og give dig en henvisning til fysioterapi.

Så spørger du måske, kære politiker, hvad det kommer dig ved. Hvad er det, jeg vil?

Du har fortalt mig, at det bekymrer dig, at der bliver stadig flere ældre og færre i den arbejdsdygtige alder til at tjene de penge, det koster at pleje dem. Du taler om at forlænge den tid, man er på arbejdsmarkedet, så pensionsalderen måske bliver 70 i stedet for som nu 67.

Det bekymrer mig, især fordi jeg ved, at mig og rengøringskonen ikke orker at blive på arbejdsmarkedet, til vi er 67, måske nærmere 60, og at vi i en tidlig alder kommer til at optage nogen af de dyre plejehjemspladser til en million stykket i oprettelse plus løn til plejepersonale.

Og så var det, jeg tænkte, kære politiker, om det måske ikke var en idé at få fysioterapeuterne ud på arbejdspladserne, så de kunne være med til at forebygge skaderne, så vi kunne bevare arbejskraften længere, og så rengøringskonen ikke havde så ondt, så du bare ikke aner det. Det ville måske spare nogen af de dyre plejehjemspladser på længere sigt og give os mere arbejdsglæde.

Vil du gøre noget ved det, kære politiker.

# HOV-ØRAVÍK TUNNILIN SKAL GERAST VERULEIKI !!!

**Johan Dahl**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Tað skal ongin ivið verða um at Hovseggin sum er vandamiklasta vegastrekki í landinum skjótt skal verða søga!!!

Hetta vegastrekkið hevur tænt okkum væl síðan tað bleiv gjørt, tað ivast ongin av okkum heldur í, - men tíðin er farin frá hesum vegastrekkið.

Vegurin sum er um 4 metur breiður, bleiv ikki gjørdur til at klára hendan trafikkin; - vit skulu minnast til at tá í vegurin bleiv gjørdur var ein lastbilur uppa 10 tons ein stórur bilur!! Nú er tað vanligt at bilarnir flyta 35-40 tons ella meir eftir hesin vegi og trafikkurin er nógvur, bæði hvat viðvíkur farma- og persónsflutningi.

Tunnilin skal gerast millum HOV OG ØRAVÌK, - tað skal ongin ivast í verður veruleiki!!!

Veljið Sambandsflokkin tann 30.april - tá stuðlar tú eini góðari søk.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Byggja stórt "KOLLEGIUM" til lesandi

**Jónfinn Olsen**
*Form. í UfM & valevni Miðfloksins í Suðurstreymi til Løgtingsvali*



Eg skrivaði herfyri, um at verja tey ið nema sær útbúgving á miðnámsskúlunum í Føroyum.

Arbeitt skuldi verið fyri at fingið bygt eitt stórt (so tørvurin verður nøktaður) "kollegium", har hesar miðnámsútbúgvingar nú finnast, so "íbúðartørvurin og leigukostnaðurin vera nøktaðir (nakað at búgva í, og rímiliga bíligt).

At tey ungu kunna mennast saman, ístaðin fyri at sita spjadd runt, einsamøll í einum lítlum kamari, tí tey ikki hava pening at leiga nakað rímuligt fyri, so umstøðurnar at "studera" gjørdust fyrsta floks, skuldi verið ein sjálvfylgja.

Tí eiga vit at arbeiða framm í móti, at "KOLLEGIIR" verða bygd til tey lesandi, at leiguprísurin skal vera rímiligur, og at hesin peningur verður brúktur til raksturin av "KOLLEGIUNUM".

Hægri studning og nakað gott at búgva í, tað kundi verið nakað at arbeitt fram í móti.

Hugsa um hvønn tú stuðlar, er tað ein, ið hugsar um teg?

# Sera einfalt: Samband merkir økt frælsi Loysing merkir skert frælsi

**Marjus Dam**
*Sambandsflokkurin*



Hví er loysingarrørslan ikki erlig og tvinnar loysing og skerjing saman. Byggir hendan rørsla á ósannindi - og er grundarlagið demagogi og pellarí? Tí at tvinna loysing og frælsi saman, er pellarí

**Ríkisfelagsskapurin gevur persónligt frælsi:**
Um vit hyggja eftir sambandinum ímillum Føroyar og Danmark, so gevur hetta samband føroyingum óteljandi rættindir. Til dømis útbúgvingar á hægri og lægri lærustovnum, sjúkrahúsviðgerðir o.a. Ein føroyingur kann flyta í ríkinum, júst sum um ein føroyingur kann flyta í Føroyum. Ein føroyingur hevur sum ríkisborgari somu rættindir sum Anders Fogh Rasmussen.

Ei undir í, at bíðirøðin av fremmandum er long at sleppa at flyta inní okkara ríkið, ið flýtur av "mjólk og hunangi". So stórt er ynski um tilflyting í okkara ríki, at ríkismyndugleikarnir nú royna at tátta í.

Rættindir í okkara ríki, ið onnur ynskja sær so nógv, roynir loysingarrørslan í Føroyum at forkoma, eins og teir nú hava søpla 400 milliónir krónur burtur, uttan at tora at spyrja um fólksins hugsan á eini fólkaatkvøðu. Tá teir hava loyst, so eru øll hesi rættindir mist umframt 1400 milliónir kr árliga.

Minkaðu rættindini kalla teir frælsi. Hevði tað ikki verið rættari at kalla loysing fyri loysing og samstundis viðgingið, at prísurin fyri hesa loysing er eitt skert frælsi, bæði á persónliga og fíggjarliga økinum.

Vit kunnu siga, at loysing og ófrælsi eru tengd saman. Ístaðin fyri at ferðast frítt í ríkinum, so kann ein ferðast frítt, innistikaður í lítlum petti í norðuratlanshavi, við skerdum persónligum og fíggjarligum møguleikum. Loysingin er tí ein stór vanlukka fyri Føroyar. Vandi er fyri at Føroyar sum tjóð forfarast. Men hesi viðurskiftir roynir loysingarrørslan at fjala fyri føroyingum øllum.

**Ríkisfelagsskapurin gevur fíggjarligt frælsi:**
Taka vit fíggjarliga síðuna av hesi eind, so er Danmark er land, ið er fíggjarliga væl fyri. Teir hava verið framkomin landbúnaðar og ídnaðartjóð í mong ár, umframt oljutjóð. Tá soleiðis er, og ríkispartarnir eru síðustillaðir, er ikki undarligt at nakrar funktiónir verða tryggjaðar øllum pørtum av ríkinum. Fyri at ríkið alt skal verða best møguliga fyri sum ein líkastilla eind. Her kemur ríkisveitingin inn í myndina við Skúlanum, Almannaverkinum og Heilsuverkinum. Ríkið tryggjar, at hesi viðurskiftir eru nøktandi og á høgum støði, og vil gjalda fyri hetta í Danmark, Grønlandi og Føroyum. Ein sera góð skipan, um hon var framd eftir ætlan. Um føroyski politiski myndugleikin var vakin, so høvdu vit havt heimsins besta skúla, heilsuverk og almannaverk. Tí nevniliga Ríkisfelagsskapurin kundi tryggja hesum. Sambandsflokkurin er førur fyri og vil taka ábyrgd fyri at vit fáa heimsins besta skúla, heilsuverk og almannaverk at virka í Føroyum innan karmarnar av ríkisfelagsskapinum. Vit vilja virka fyri, at verkafólk koma at liva í heimsins besta landi, Føroyum. Vit kunnu. Vit duga. Vit vilja.

**Niðurstøða:**
Loysing merkir skert frælsi og flog hjá einstaka føroyinginum.

Ríkisfelagsskapur við ábyrgd og skilagóðum broytingum, ið vit hava nevnt í Nýskipanaruppskoti okkara, merkir økt persónligt og fíggjarligt frælsi, ið aftur gevur møguleika fyri øktari vælferð.

Vit vilja gera Føroyar til heimsins besta land at búgva í.

Tí X fyri øktum frælsi og vælferð.

X fyri Sambandsflokkinum.

# Javnaðarflokkurin vil fremja systkinaavsláttur fyri barnaansing

### - hóast trútnir tjóðveldismenn mótmæla

**Hans Pauli Strøm**
*javnðartingmaður fyri Norðurstreymoy*



Vegna Javnaðarflokkin løgdu Kristian Magnussen og eg í febr. í ár uppskot á ting um at veita foreldrum, sum hava fleiri børn í dagrøkt, dagstovni ella frítíðarskúla, eina systkinarabatt í foreldragjaldinum. Tjóðveldismenn eru vorðnir firtnir um hetta. Ein teirra er Heini Holm, sum glepsar eftir mær í Dimmu leygardagin, og sigur at eg "geri álop á tað kommunala sjálvstýrið", tí barnaansingin er kommunalt og ikki landspolitiskt mál. Uttan við einum orði at umtala, hvat uppskotið gongur út uppá, fær hann tað til at "Hans Pauli Strøm hevur sett uppskot fram á løgtingi um at økja dagstovnaútreiðslurnar hjá kommununum við meira enn 10 mió. kr. árliga." Hetta er Heini ógviliga trútin um og gremur seg gjøgnum alla greinina um hetta "fíggjarliga ábyrgdarloysi" hjá javnaðarflokkinum, at vilja veita systkinarabatt í foreldragjaldinum.

**Kommunurnar skulu ikki gjalda syskinaavslátturin**
Tjóðveldismenn, sum eru so harðliga ímóti uppskotinum, áttu at sett seg betur inn í tingini, áðrenn teir øsa seg upp. Tí um teir høvdu lisið viðmerkingarnar til uppskotið og okkara álit úr trivnaðarnevndini, høvdu teir skilt, at tað IKKI er ætlanin, at kommunurnar skulu bera kostnaðin av systkinarabattini. T.d siga vit í álitinum: "Tað at uppskotið, um tað verður samtykt, ikki kemur í gildi fyrr enn 1. jan. 2003, gevur landsstýrinum ríkiligt skotbrá til at taka upp samráðingar við kommunurnar um, hvussu tær kunnu haldast fíggjarliga skaðaleysar av teim øktu kommunalu útreiðslunum, sum uppskotið hevur við sær".

At tað ikki eru kommunurnar men landskassin, sum skal bera kostnaðin av systkinarabattini, áttu Heini og hinir firtnu tjóðveldismenninir eisini at duga at sæð í valskránni, sum Javnaðarflokkurin júst hevur kunngjørt. Har høvdu teir sæð, endurgivið í bløðunum (í Dimmu enntá tvær ferðir), eina talvu við yvirskriftini: "Kostnaðarmeting fyri landskassan av valskrá 2002 í mió.kr." Har stendur m.a. "Systkinaavsláttur" og fyri hvørt ár stendur upphæddin 10 mió.kr. Heini skal tí ikki bera ótta fyri sínum kommunala pengakassa av hesum ávum.

Tað er heldur ikki rætt, at løgtingið ikki skal lóggeva um mál, sum eru latin kommununum at umsita. Júst í lógini um dagstovnar og dagrøkt hevur løgtingið ásett um foreldragjaldið, at tað má ikki fara upp um 30% av kostnaðinum. Løgtingið kann tí eisini áseta aðrar reglar um foreldragjaldið, m.a. um systkinaavsláttur. Júst við at seta slíkar reglur í lógina, fáa foreldur somu umstøður, uttan mun til hvar í landinum tey búgva, og uttan mun til, hvussu barnaella familjuvinarligan politikk tann einstaka kommunan annars hevur hug at reka.

**Endamálið er at bøta um korini hjá barnafamiljunum**
Tjóðveldisflokkurin var í meirilutanum, sum feldi uppskotið í løgtinginum. Javnaðarflokkurin heldur fast við, at tað eigur at fremjast, tí hetta er eitt neyðugt stig til at bøta um fíggjarligu korini hjá foreldrum, ið hava fleiri børn í dagrøkt, dagstovni ella frítíðarskúla. Hjá teimum eru barnaansingarútreiðslurnar møtimiklar, og hartil hava barnafamiljurnar eisini stórar bústaðarútreiðslur og nógvar aðrar útreiðslur í sambandi við børnini. Tað er hetta málið snýr seg um - hóast tjóðveldismenn gremja seg og tosa uttanum.

# Arbeiðsrættur vil skerja rættin hjá fakfeløgunum – Og styrkir avgerðir, sum arbeiðsgevarin tekur

**Joan Ziskason**
*www.jozi@post.olivant.fo*



Ávísir tingmenn og flokkar hava ynski um at seta á stovn arbeiðsrætt í Føroyum.

Fakfeløg hava í fleiri ár mótmælt, at ein slíkur verður settur á stovn. Ein arbeiðsrættur skerjir møguleikan hjá einum fakfelag at brúka vanligu rættargongdina. Sum er í dag, hava tey flestu fakfeløg, fyri ikki at siga øll, møguleikan til at taka mál upp í gerðarrætti, um arbeiðsósemjur stinga seg upp. Um feløgini ikki eru nøgd við avgerðina í einum gerðarrætti, hava tey møguleika at kæra úrskurðin, og royna málið gjøgnum vanligu rættargongdina.

Ein arbeiðsrættur skerjir henda møguleika, tí avgerð, tikin í einum arbeiðsrætti, er endalig.

Fakfeløgini hava tó toygt seg so langt, at tey vilja samráðast um ein øðrvísi rætt enn gerðarrættin. Uppskotið hjá fakfeløgunum er ein víðkaður gerðarrættur, sum, mær kunnugt, øll fakfelagsrørslan tekur undir við.

Javnaðarflokkurin er ímóti arbeiðsrætti. Javnaðarflokkurin hevur ta áskoðan, at eingin arbeiðsrættur skal smoyggjast yvir høvdið á nøkrum fakfelag ella limum tess.